

*Valið í september kann gerast tað seinasta hjá Gøran Persson. Myndin er tikin í Havnar Kirkju í augustmánaði í fjør, tá Føroyar á fyrsta sinni høvdu svenska forsætisráðharravitjan*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Sviar svíkja Persson

**Alt bendir á, at svenska ríkisdagsvalið í næsta mánaði verður sera spennandi, og hvørgin parturin torir at kanna sær sigurin**

VAL Í SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Eru tær seinastu veljarakanningarnar eftirfarandi, eru dagarnir hjá Gøran Persson sum forsætisráðharra farnir at fækka.

Fyri nøkrum døgum síðani vísti ein kanning, sum kanningarstovnurin Sifo hevði gjørt fyri Dagens Nyheter, at teir borgarligu Moderaterna, Kristendemokraterna, Centerpartiet og Folkpartiet fara at fáa 50,5 prosent av atkvøðunum tann 17. september, meðan Sosialdemokratarnir og teirra stuðulsflokkur, Vinstraflokkurin og Umhvørvisflokkurin, fáa 45,8 prosent.

Sama dag kunngjørdu sjónvarpið TV4 og blaðið Expressen eina kanning, sum vísti at kalla sama úrslit.

Báðar kanningarnar vístu somu gongd. Undirtøkan hjá Sosialdemokratunum minkar, meðan undirtøkan hjá teimum borgarligu flokkunum veksur. Halda kanningarnar, fær sosialdemokratiski flokkurin 34,6 prosent, og tað eru trý prosentstig minni, enn flokkurin fekk í einari tilsvarandi kanning fyri tveimum mánaðum síðani. Øvugt er hjá tí stóra borgarliga flokkinum, Moderaterna, sum eftir kanningunum fær millum 27 og góð 30 prosent. Tað er næstan tvær ferðir meiri, enn flokkurin fekk á valinum fyri fýra árum síðani.

- Hetta er ikki so álvarsamt, sum tað kann tykjast, sigur skrivarin í sosialdemokratiska flokkinum, Marita Ulvskog, við Dagens Nyheter. Hon sigur, at tað hevur altíð verið so, at Sosialdemokratarnir hava verið í einum aldudali eftir summarfrítíðina, og tí er hon ikki so skelkað av kanningarúrslitunum, sigur hon.

## Upp og niður

Tað er einki at siga til, at teir politikararnir á báðum síðum aftra seg við at siga so nógv um veljarakanningarnar, tí tað seinasta árið hava úrslitini verið sera ymisk. Eitt skifti í fjør var undirtøkan hjá teimum borgarligu flokkunum umleið tíggju prosent størri enn hjá hinum, men so vendi rákið, og fyri nøkrum mánaðum síðani bendu kanningarnar á, at sitandi stjórnarsamgonga fór at vinna. Men nú er vágskálin aftur broytt.

Hetta vísir, at tað eru óvanliga nógvir veljarar, sum ikki hava tikið støðu enn, og tí leggja allir flokkar dent á at fáa fatur á teimum mongu, sum enn ivast, og hendan kappingin fer at standa við líka til valdagin.

Undir valstríðnum hevur Gøran Persson brúkt slagorðið »Det går bra for Sverige«, og tað tykist eisini, sum at mong hava hug at geva honum rætt í tí. Samstundis kann hann vísa á, at undir hansara leiðslu hevur Svøríki havt støðug politisk viðurskifti tey seinastu tíggju árini.

Styrkin hjá teimum borgarligu til júst hetta valið er, at flokkarnir tykjast vera so samdir sum kanska ongantíð áður, og tað ger, at teir eru ein størri avbjóðing til vinstravongin enn fyrr, skrivar Dagens Nyheter.

## Loyniligt valstríð

At tað tykist standa næstan á jøvnum ímillum teir báðar partarnar ger, at valstríðið er øðrvísi enn fyrr. Eitt nú ber als ikki til at fáa at vita, hvat ein av oddapolitikarunum verður í næstu viku. Nei, tað verður dult sum mansmorð, fyri at mótparturin ikki skal fáa høvi til at gera nakran mótleik.

- Soleiðis er tað, tá tað er so javnt, sigur talskvinnan hjá Moderaterna, Ulrika Schenstrøm, við TT-tíðindastovuna.

Vanliga plaga sviar at vita, hvar forsætisáðharrin er, og teir plaga at fáa at vita í góðari tíð, hvar hann ferðast, men soleiðis er ikki í hesum døgum. Nú verður ferðaætlanin hjá honum ikki almannakunngjørd fyrr enn í fyrsta lagi tríggjar dagar, áðrenn hann fer úr Stockholm. Tann almenna frágreiðingin er, at tað er neyðugt at vera varin í einum landi, har bæði ein forsætisráðharri og ein uttanríkisráðharri eru vorðnir myrdir. Men tann veruliga frágreiðingin er, at ferðaætlanin verður duld, so kappingarneystarnir ikki fáa ov góðar stundir til at umráða seg.

Fyrrverandi politiski blaðstjórin á Svenska Dagbladet, PJ Anders Linder, skrivaði fyrr í vikuni, at Gøran Persson kann fáa somu lagnu sum Kjeld Magne Bondevik fekk í Noregi, tá hann bleiv sópaður av pallinum. Men tað er als ikki vist kortini, legði hann afturat.



*Tapir Persson, verður formaðurin hjá Moderaterna, Fredrik Reinfeldt, næsti svenski forsætisráðharrin.*

### FAKTA

**Úrslitið í 2002:**

Sosialdemokratarnir 39,8 prosent
Umhvørvisflokkurin 4,6 prosent
Vinstraflokkurin 8,3 prosent
Moderaterna 15,2 prosent
Folkpartiet 13,3 prosent
Kristendemokraterna 9,2 prosent
Centerpartiet 6,1 prosent